LM-053/2022

Fylgiskjal 5

Hoyringssvar til uppskotið um løgtingslóg um grundvatn

Uppskotið snýr seg m.a. um at staðfesta, at myndugleikar hava fyrsta rætt til at gagnnýta møguligt grundvatn, og at myndugleikin, sum fær rættin, hevur rætt til at gera seg inn á privata ogn uttan endurgjald.

Eg undrist á at mann tekur í álvara um lógin kann hava ávirkan á barnarættindasáttmálan, men at mann ikki viðger um lógin kann hava avleiðingar fyri rættarstøðuna hjá borgarum, sum verða fevndir av lógini.

Borgarar eru longu ógvuliga illa vardir móti myndugleikum, og hendan lógin er aftur ein skerjing av privatum frælsi, sum grundlógarstaðfesti ognarrætturin er, og tað er upp á sítt pláss at slíkar lógir viðurkenna tað.

Alt gott um tað, at landið eigur rættin til alt tilfeingi, men eigur tað so nevnliga at verða staðfest í lógini, at eitt inntriv frá myndugleikans síðu eigur at verða gjørt virðiligt, í samráð við borgaran og við eventuellari kompensatión, tí tað er nú altso so, at har verður eitt virði tikið frá lendinum hjá borgaranum. Tað skurrar. Tað er okkurt ósmagligt við sovorðnum undantøkum til ognarrættin, og tað er ikki uttan orsøk, at borgarar í summum londum hava rætt til tilfeingið í síni egnu jørð. Støðan í Hundsarabotni er eisini eitt fordømi um tað.

Tað er ikki nóg neyvt greitt frá, hvat tað vil siga at ognartaka lendi, og myndugleikin fær ov sterkt grundarlag við hesi lógini, tí tað er ov lætt at ognartaka ein kvadratmetur við einum loddrættum holi – ella er talan um ognartøku av 200(ella hvat tað er) vertikalum metrum?

Tað hevði sømt seg at gjørt greitt, at fyrrverandi eigarin, eftir at holið er ognartikið, framvegis hevur brúksrætt til hita í holinum, og at endurgjaldið fevnir um kostnaðin borgarin hevði av at grava holið umframt prísin á kvadratmetrinum mitt inni á matriklinum. Nú eri eg ikki nóg væl vitandi, men vónandi er onkur nevnd ella onkur óavhangig meting til grund fyri, hvussu myndugleikin kann ognartaka lendi, hvussu nógv og undir hvørjum treytum.

Við hesum missir borgarin tann sera attraktiva møguleikan at leggja heita vatnið, sum rennur upp, beint inn í húsini, men má heldur velja annað og dýrari alternativ.

Í praksis fer hetta at merkja, at myndugleikin skal vera uppií arbeiðnum at grava jarðhitahol frá byrjan, og má nokk virka sum sparringspartnari hjá eigaranum av holinum, tí eigarin nú fyrst má hava at vita, hvussu mann kann bera seg at, og um myndugleikin fer at krevja Prima Nocta ella ikki. Skal tað forrestin ígjøgnum ymsar nevndir, sum aftur tekur fleiri mánaðir? Hetta hevur við sær eyka umsiting fyri myndugleikan. Um bygging seinkast av hesum, so hevur tað so sanniliga eisini eyka avleiðingar fyri byggivinnu og einstaka borgaran.

Lógin fær afturvirkandi virknað í tann mun, at myndugleikin hevur rætt til frárennandi avlopsvatn frá longu virkandi hitaskipanum, sum longu verður brúktur til annað - alt frá at hava útisvimjihylar, dypping í ósunum og til at hita eplaveltur.

Har myndugleikin áðrenn skuldi bera seg semjusøkjandi at mótvegis borgaranum, kann myndugleikin nú, við hesari lógini, tilsíðuseta borgaran heilt, t.d. við omanfyri nevnda avlopsvatni, har Tórshavnar Kommuna í einum aktuellum dømi hevur ætlan um, <u>í samráð við grannarnar sum verða ávirkaðir</u>, at savna avlopsvatnið frá fleiri jarðhitaholum í ein brunn, og afturfyri ruddar kommunan upp í slangum og snøggar lendið. Nú er kommunan noydd til at vera í samráð við grannarnar, tí arbeiðið gongur fyri seg á fleiri privatum matriklum, men við hesi lógini liggur eingin binding á myndugleikum um at bera

seg semjusøkjandi at. Trendurin er sostatt tann, at mann fer frá eini mannagongd har mann skal fyrihalda seg virðiligt mótvegis menniskjum, til eina mannagongd har mann sleppur undan at hava við menniskju at gera, og leggur hetta ikki upp til, at myndugleikar skulu vera semjusøkjandi, men gevur tað heldur myndugleikunum heimild til at uppføra seg sum tyrannar.

Tá borgarin er so illa vardur móti myndugleikum, so eigur skil at vera í mannagongdum, og har eigur at vera ein fyrimyndarlig praksis, sum myndugleikar handla eftir. Eisini tá tað gongur galið!

Fyri at koma við einum konkretum dømi:

Grannin hjá okkum gravaði tað famøsa holið í Kollafirði, har heitt vatn rennur burturúr. Fólk frá kommununi og Jarðfeingi vóru áhaldandi á ófráboðaðari vitjan og blandaðu seg uppí og gingu í vegin, og myndugleikarnir hava sjálvir mett, at handfaringin var til nóg stóran ampa fyri borgaran, at mann valdi at grava eitt annað hol til at gera sínar kanningar.

Men hetta skapti aftur avbjóðingar, tí mann merkiligt nokk valdi ta loysnina at grava holið inni á parkeringsplássinum á einum privatum matrikli, uttan lógarheimild, uttan at spyrja seg fyri, uttan yvirhøvur at kontakta eigaran av matriklinum áðrenn ella aftaná. Eigarin var tá á ellisheimi, so tað var kanska mett óneyðugt at kontakta hann? Tað er ikki til at vita, tí alt innanhýsis skrivligt samskifti steðgar brádliga bæði hjá kommununi og hjá Jarðfeingi.
Tá vit seinni keypa matrikkulin tekur tað fleiri ár bara at fáa staðfest, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina av holinum, og nú tað endiliga er komin gongd á, og semja er ávegis, sum er nøktandi fyri báðar partar, eru vit blivin varug við at kommunan er lopin frá, tí at hendan lógin sannlíkt fer grundleggjandi at skeikla samráðingarstøðuna frá at vera til okkara fyrimun og til at vera til fyrimun fyri kommununa. Okkurt er eisini at siga um rættarstøðuna, tá myndugleikar kunnu loyva sær at bera seg soleiðis at móti borgarum.

Fyri at taka saman um; borgarar eru ikki nóg væl vardir móti myndugleikum, og tað er ikki rætt, at hendan lógin, soleiðis sum hon fyriliggur, ikki hevur avleiðingar fyri borgaran, bæði direkta og indirekta.

Vh

Maja Nilsson og Heðin Jákupsson

Í Líðini 75

410 Kollafjørður